# SMÁU SEÐLARNIR GJØRDUST TIL STÓRA BYGDARSØGU

**BYGDARSØGA** *Veitst tú hvat, Petur Jacob: Tú ert ein dummur hundur.* Soleiðis ljóðaði skoðsmálið um bókarøðina »Úr Gjáar søgu« hjá Petur Jacob Sigvardsen. At tað var bygdarmaður hansara, Hans Jacob Debes, professari, sum átti tey, gjørdi ikki støðuna betri. Petur Jacob stóð sum kánus, tí beint frammanundan hevði hin gjáarmaðurin róst bókunum upp til skýggja. Nú fekk hann ístaðin eina slíka skortfleingju. – Hvat meinar tú við?, mátti eg so spyrja afturímóti, greiðir 78 ára gamli, men framvegis virkni rithøvundurin frá.

## Errin gjáarmaður

Hans Jacob Debes hevði, eins og Petur Jacob stóran áhuga fyri søguni um heimbygd sína.

Tá tær báðar fyrstu bøkurnar komu út, gav hann teimum eitt sera gott ummæli. Her nevndi hann millum annað, at tær høvdu tey eyðkennini, sum kravdust fyri einari lokalsøgu.

Undan útgávuni av Barnaminnum 1 og 2 læt Petur Jacob vinmann sín lesa handritið ígjøgnum. Tað gekk kortini rúm tíð, til hann varð liðugur við hetta. Men ein dagin boðsendi hann høvundanum at koma á gátt hjá sær í Torfinsgøtu í Havn.

- Eg fór so út hagar og kom innar í stovuna, har Hans Jacob sat í eini leðursofu. Handritið lá á borðinum, men hann segði ikki eitt einasta orð. Soleiðis gekk ein góð løta í tøgn - ein long og heldur løgin tøgn.

- So reisti hann seg upp, kom yvir ímóti mær tigandi, og so hendi tað, sum eg ongantíð havi gloymt: Hann hálsfevndi meg, ógvuliga sinnisrørdur og segði so: "Petur Jacob. Nú eri eg errin av at vera gjáarmaður. Hetta er eitt dygdarverk, sum tú hevur gjørt. Kann eg ikki sleppa at ummæla tær, tá tær koma út?"

- Og tú kanst ætla, at eg eisini var rørdur av hesi hendingini. Eg hevði ikki væntað, at hetta skuldi gerast ein so sinnismerkt uppliving, minnist Petur Jacob afturá.

Nú stóð so onnur útgávan í hesi røðini fyri, – hesa ferð tey bæði bindini um ta gomlu tíðina. Hans Jacob, ið tá var vorðin heilsuveikur náddi at ummæla fyrra bindið og Jákup Thorsteinsson ta seinna, og fingu tær bøkurnar sama framúr góða skoðsmál eins og tær báðar undanfarnu.

Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

**Gjógv:** Pallurin fyri hesi sjáldsomu hendingini við teimum ógvusligu orðunum var heima við hús hjá professaranum í Havn.

Hans Jacob Debes hevur júst tá ummælt báðar tær fyrstu bøkurnar um søguna hjá heimbygd teirra. Hetta hevði hann gjørt við stórum áhuga og mestu lovorðum. Men eftir gjøllari umhugsan var tó eitt lítið MEN - ein lítil, men kortini væl meint viðmerking komin aftrat:

– Tað, sum tú, Petur Jacob, hevur skrivað, er ikki bara søgan hjá eini fjarskotnari føroyskari bygd. Heitið á bókini er fullkomiliga skeivt. Tí, - tað sum tú í roynd og veru hevur skrivað, er als ikki bert søgan hjá Gjáar bygd. Hetta er einki minni enn tann føroyska bygdarsøgan í einum ávísum tíðarskeiði.

– Sært tú. Eindarmentanin og bygdarlívið á Viðareiði, í Sumba ella í Vágum var neyvan nógv øðrvísi, enn tað var norðuri við Gjógv. Tað eru kanska 70 prosent av innihaldinum, ið er føroysk bygdarsøga, meðan restin er tað, ið sermerkir ta einstøku bygdina, vísti Hans Jacob Debes á.

– Ja, sigur Petur Jacob. - Hann hevði helst grein í sínum máli. Itu bøkurnar kanska "Føroyska bygdarsøga tá og tá", so høvdu tær helst verið skjótari keyptar, hóast tær nú mestsum eru útseldar.

### Bygdin fúnar

Síðan fyrsta bókin um Gjáar søgu kom út í 1997, eru fleiri komnar henni á baki, har barnaminni og tann gamla tíðin eru umrødd bæði væl og virðiliga.

Men Petur Jacob gevst kortini ikki á hondum. Hann arbeiðir nú við teirri fimtu og helst seinastu bókini í teirri røðini.

– Ja, henda bókin skal lýsa ta nýggju tíðina; um hvat er broytt við bygdarlívinum; hvar fólkini eru farin; hví tey fluttu, og hvørja avleiðing tað hevur havt fyri bygdina.

– Hetta er kanska tann mest spennandi bókin, tí hon fer at lýsa, hvussu ein bygd fer, og hvussu hon spakuliga sovnar og fúnar burtur. Eg havi longu skrivað 120 tær fyrstu síðurnar, staðfestir Petur Jacob.

Fyri veruliga at lýsa hetta áhugaverda evnið hevur hann mestsum longu gjørt av, hvør mynd skal verða á permuna: Myndin skal vera av tí nýggja býlinginum við teimum mongu summarhúsunum, sum ætlanin er at byggja við Gjógv.

### Nýbakað breyð

Petur Jacob er borin í heim í eini tíð, har fólk veruliga hildu saman og brúktu tíð saman við hvørjum øðrum, serliga í eini so fjarskotnari bygd sum við Gjógv.

**» Hetta er kanska tann mest spennandi bókin, tí hon fer at lýsa, hvussu ein bygd fer, og hvussu hon spakuliga sovnar og fúnar burtur. Eg havi longu skrivað 120 tær fyrstu síðurnar**

Barnaheim hansara var eitt teirra, har nógv fólk komu á gátt skýmingarsetur og um kvøldarnar. Har búðu trý ættarlið undir sama taki, og tað skapti sum vera man ein serligan dám innanveggja.

– Mær dámdi sera væl at lurta eftir og leggja mær í geyma tað, sum tey gomlu bóru fram á mannamunni. Ja, tað kendist, sum var alt dagsverkið eftirmett í køkinum tær hugnaligu løturnar, tá ið breyðeldurin brimaði í komfýrinum, nátturðapotturin kókaði á 1. holi, ketilin stóð og fossfeldi á 2. holi, meðan bláa tekannan stóð heit á

Føroyaprent plantar trø